# Viðmerking til eitt ikki-kjak um digitala sendinetið

**Televarpið**
*Laila Hentze, stjóri*
*Andras Róin, nevndarformaður*

Kjaksendingin í SvF í gjárkvøldið t. 14. desember snúi seg um almennu fjølmiðlarnar, samanlegging, visiónsloysi og hvat ið lurtarin/hyggjarin nú vildi fáa burturúr samanlagda skatta- og tvangsfíggjaða "public service" monopolinum.

Ein av undirritaðu slapp, í einum broti, at gera viðmerkingar til eitt kjak sum møguliga fór at koma, men tíanverri ikki "interaktivt". Vit hava tí fylgjandi viðmerkingar og rættleiðingar:

1. Jenis av Rana slapp at enda at siga, at Føroya Tele fekk 4-5 mió. kr. um árið fyri at reka ÚF og SvF sendinetini. Tað er rætt, men hetta snýr seg bert um analogu sendinetini. Hetta er ein tænasta, sum er áløgd Føroya Tele og sum eingin partur er nøgdur við vegna vantandi játtanir á árligu fíggjarlógini. Soleiðis hevur hetta einki við digitala sendinetið hjá dóttirfelagnum Televarpinum at gera.
2. Andreas Petersen, formaður í mentanarnevnd Føroya løgtings, meinar, at einki er í vegin fyri at taka digitala sendinetið frá P/F Televarpinum, tí sum hann sigur, "hatta eigur at vera alment"!

Til hetta sjónarmið hava vit fylgjandi viðmerkingar:

a. Telefonverk Føroya Løgtings (TFL) bleiv í 1998 umskipað til eitt partafelag, tí kapping skuldi verða á fjarskiftisøkinum, og felagið skuldi verða ført fyri at kappast á jøvnum føti við aðrar veitarar. Hetta hava vit megnað í tann mun, at samstundis sum prísirnir eru lækkaðir niður í millum ein triðing og eina helvt, so hevur felagið fýrfaldað eginpeningin. Við at leita upp úr nýggjum, at vera slóðbrótandi, at rationalisera og við at síggja møguleikar í staðin fyri avmarkingar, so hava vit m.a. megnað at uppbygt eitt dóttirfelag, Televarpið, sum eigur og rekur eitt framkomið digitalt sendinet og virkar á handilsligum konsepti, sum er millum tey fremstu í Evropa — og eisini hevur fingið viðurkenning sum slíkt.

b. Digitala sendinetið er ein útflutningsvøra. Føroyar sum útflytari av knowhow, ekspertisu og ritbúnaði eru nærliggjandi møguleikar í hesum, og er tað sera hugstoytandi, at sjálvt landsins útvaldu ikki duga at síggja hetta. Um føroyska samfelagið og føroyski búskapurin skal hava fleiri bein at standa á, nyttar ikki at landsins kosnu amputera alt, sum riggar, og køva eitthvørt initiativ niður í alment máttloysi.

c. Um umskipan til almenn partafeløg merkir, at "nú skulu tit rættuliga vísa, hvat tit duga — og um tað riggar, so taka vit tað frá tykkum", ja, so er alt betur ógjørt. ÚF, SvF og politiska skipanin vita, at einki digitalt sjónvarssendinet hevði verið í Føroyum í dag, um ikki Televarpið var byrjað við hesum fyri tveimum árum síðani. Helst hevði tað verið so, at Føroyar um 10 ár framvegis høvdu havt eitt vánaligt analogt sendinet, sum als ikki megnaði at nøkta nakran tørv. At tit í sambandi við løgtingsfíggjarlógir framvegis høvdu keklast um, hví einki riggaði og hvør ið mátti hava skylduna er givið.

1. Júst hví almenna loftmiðlamonopolið, ÚF og SvF, skulu hava ein ræðisrætt ella ein eigaraskap yvir digitala sendinetinum stendur okkum enn óklárt. Er tað tí, at ikki ber til at rættvísgera 2.000,00 + 1.500,00 kr. pr. húsarhald fyri tað, sum verður veitt? Um so er, so vildu vit mett at tykkara orka var betri nýtt til nakað, sum tit duga, nevniliga at framleitt betri og fleiri sendingar enn nú, heldur enn til nakað sum tit als ikki hava skil fyri — nevniliga at reka tøknifrøðilig sendinet.
2. Við einum digitalum sendineti, undir reguleraðum treytum (gjøgnum almenna stovnin Fjarskiftiseftirlitið), við veitingarskyldu og við gjøgnumskygni, soleiðis at øll sleppa framat, vildi verulig kapping eisini sloppið framat innan sjónvarps- og útvarpssendingar, men tað er væl tað, sum etableraðu og alment fíggjaðu "public service"-monopolini ikki tora skal verða ein møguleiki.
3. At partarnir í sendingini komu ásamt um, at við at taka digitala sendinetið frá P/F Televarpinum, soleiðis at gordiski knúturin kundi loysast, er symptomatiskt. Tá ið Føroya Tele og Televarpið megna at byggja nakað serstakt upp, er tað so lætt at koma ásamt um, at "hetta mugu vit heldur taka frá teimum". Hetta er tekin um alment máttloysi, sum forkemur øllum visjónum hjá Føroya Tele og Televarpinum um at vera við til at menna Føroyar sum framkomið KT-samfelag.

At enda skulu vit bert nevna, at hóast politikarar og fjølmiðlar hava viðgjørt málið og digitala sendinetið í eina tíð, so hevur eingin — als eingin, higartil vent sær til hvørki Føroya Tele ella til Televarpið, sum hóast alt eigur, hevur goldið og rekur digitala sendinetið. Ikki so frætt sum ein fyrispurningur um samstarv hevur verið, hóast vit altíð hava verið opin fyri samstarvi. Sjálvt ikki almenni loftmiðlastjórin hevur fyrispurt um nakað sum helst, hóast hesin í tilmæli til landsstýrismannin í mentamálum um framtíðar SvF hevur kraftigt ynski um bæði yvirtøku av digitala sendinetinum og mest attraktivu rásunum hjá Televarpinum.

Er tað so, at almenna loftmiðlamonopolið livir sítt egna lív og opinlýst roknar við politiskum stuðli til at traðka vinnuliga initiativið niður fyri at fáa almenna loysn í staðin, sum er púra óneyðug? Hetta eigur ikki at vera gongd leið hjá teimum politikkarunum, sum dagliga tosa um nýskapan og menning av nýggjum útflutningsvinnum.







## Virkisleiðari

P/F United Seafood søkir eftir virkisleiðara til virkið á Toftum. Virkisleiðarin skal hava ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum á Toftum. Virkisleiðarin luttekur aktivt í søluarbeiðinum. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F United Seafood Toftir framleiður saltfisk. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigi. Arbeiðið á United Seafood Toftir fer fram sambært innaneftirlitsskipan. Í 2003 virkaði virkið uml. 7.000 tons av rávøru.

Uppgávurnar hjá virkisleiðarinum verða m.a.

- Leiða arbeiði á United Seafood Toftir
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan.
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
- Samstarv um keyp av rávøru.
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarar.

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar

- Relevanta útbúgving á passandi støði.
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
- Leiðslueginleikar.
- Góðan málkunnleika.
- Góð samstarvs- og kommunkatiónsevni.

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Lønina tosa vit um.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 2. januar 2005.

Møguligir umsøkjarar kunna seta seg í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

REPROZ

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"